# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

Hasla Elder:

# – David er stoltur av at vera av føroyskari ætt!

**Omma David Carry, sum hevur umboðað Bretland í svimjing á summarleikunum í Beijing lýsir David, sum eitt gott menniskja, og sum eina sanna leiðaratypu**

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



David Carry og liðfelagarnir vóru bert 96/100 av einum sekundi frá at vinna eitt olympiskt bronsumerkið í 4 x 200 metrar frí. Men David, Ross Davenport, Andrew Hunter og Robbie Renwick kunnu kortini verða stoltir av avrikinum hjá sær. Umframt at gerast nr. 6 í Heimsins størstu og bestu ítróttarkapping, so settu hesir fýra bretsku svimjarnir eisini tvey bretsk met innanfyri eitt samdøgur. David sjálvur setti bretskt met fyri sínar 200 metrar, sum einstaklingur, og kunnu liðfelagarnir í stafettini bera høvdið høgt. Bretska metið hjá David í 200 metrar frí er 1.46.47. Fyrra metið hjá stafettliðnum fyri 4 x 200 metrar frí er 7.07.89. Hetta bretska metið varð sett í hálvfinaluni, sum var týsdagin. Mikudagin slóu bretarnir sítt egna met í finaluni, og endurnýggjaðu bretska metið við tíðini 7.05.92, og megnaðu David og liðfelagarnir soleiðis at bøta um sítt egna bretska met við 2 sekundum, og tað innan eitt samdøgur.

## Ein góður drongur

Í gjáramorgun prátaði undirritaði við ommu David, Haslu Elder í morgunsendingini hjá Rás2. Hasla, sum er født Josephsen er ættað úr Klaksvík. Hasla býr í Aberdeen. Hasla sat uppi tíðliga mikumorgun fyri at fylgja við í finaluni í 4 x 200 metrar frí. – Áh sum tað ergrar meg, at hann ikki fekk hasa medaljuna. Tað var so nær, eg eri virkuliga kedd av tí. Men amerikanarnir eru ov sterkir.

Hasla greiddi eisini frá, at tann nú 26 ára gamli David varð bert 2 ára gamal, tá hann fyrstu ferð fór í ein svimjihyl, og var hon við honum tá. – David er ein einastandandi fittur drongur, og er hann ótrúliga menniskjaligur. Hann er ein sannur føroyingur. Hann líkist akkurát Álvi beiggja mínum, og er David sera stoltur av at verða av føroyskari ætt.

Tað stendur eisini nevnt í summum heimasíðum, at David Carry er ein skotskur svimjari, sum er av føroyskari ætt. Hasla greiddi frá, at tá David gjørdist Commonwealth-meistari (bretskur samveldismeistari), tá varð hann størsta hetjan í Aberdeen. Í 2006 gjørdist David Commonwealth-meistari í 400 metrar frí, og í 400 metrar medley fyri einstaklingar. Men Hasla heldur ikki, at svimjihyljarnir í Aberdeen eru nakað at reypa av. – Svimjihøllin í Klaksvík, og eisini tann í Havn eru á einum nógv hægri støði, enn svimjihallirnar í Aberdeen. Eg havi sagt við David, at hann má fara ein túr til Føroya, og royna tann deiliga svimjihylin í Klaksvík. Her í Aberdeen hugsa teir bara um at steingja svimjihallirnar.

## Betri umstøður í Onglandi

Vegna vantandi optimalar venjingarumstøður flutti David úr Aberdeen, og til økið kring Leicester í Onglandi at lesa. David hevur lisið á lærda háskúlanum í Loughborough, og har hevur hann havt optimalar umstøður at venja í 50 metrar hyli. Og úrtøkan hevur eisini verið stór. Eitt ótal av skotskum og bretskum meistaraheitum og metum, umframt commonwealthmeistaraheitini. Hasla fortelur, at David fer at gevast at svimja á hægsta stigi, men at kroppurin er so hart vandur nú, at tað fer at taka eitt ár hjá David at trappa niður aftur. Hasla væntar, sum skilst á lagnum, at David fer at verða við til at reika fyri olympisku summarleikunum, sum skulu verða í London í 2012. – David er ein sannur leiðari. Tað var beinanvegin, at hann kom í bretska svimjihópin, at hann gjørdist ein leiðari í hópinum.

David gevur sær altíð tíð at vitja ommu sína í Aberdeen, tá hann er staddur í Aberdeen. Hasla hevur heitt á David, um at koma við sær ein túr til Føroya, og vónar hon, at tað gerst veruleiki, áðrenn alt ov long tíð er fráliðin.

# Hálvfinalan hjá Katrin útsett

Katrin Olsen og Juliane Elander sluppu ikki at rógva hálvfinalu í dag. Tær báðar skuldu annars verið í bátinum klokkan 8.30 okkara tíð í morgun.

Veðrið í Beijing hevur ikki verið eftir vild. Nakað av vindi og toruslættri hevur verið í morgun, og tí eru róðrarnir í dag avlýstir.

Ístaðin verður róð í morgin, tá ætlanin annars var at halda hvíludag. Sum skilst, so er klokkutíðin framvegis tann sama. Altso klokkan 8.30 føroyska tíð fríggjamorgunin.

**Mørk**



*Toruslættur og vindur gjørdu, at Katrin Olsen og Juliane Elander ikki sluppu at seta seg við árarnar í dag í semifinaluni, sum er útsett til morgin*